Styrkispælið

Lousie Tidmand og Ivan Jacobsen hava ment spælið

Endamálið við styrkispælinum er at fortelja tær góðu søgurnar og lurta eftir teimum góðu søgunum, soleiðis at vit fáa eyga á styrkirnar hvør hjá øðrum. Gransking vísir, at trivnaður, motivatión og sjálvsvirðing mennist, tá ið vit arbeiða við styrkjunum.

Spælið leggur dent á tað góða – okkara styrkir og okkara góðu frásagnir. Spælið kann vísa okkum á okkara styrkir og hjálpir okkum at fortelja tær góðu søgurnar um okkum. Tað er alt ov sjáldan, at vit hava góðar stundir at siga tær góðu søgurnar uttan at verða órógvað.

Tá ið tit spæla styrkispælið fáa tit møguleikan, men spælið hevur eisini eitt annað endamál. Tað endamálið er, at vit við søgum úr gerandisdegnum kunnu fáa eyga á styrkirnar hvør hjá øðrum. Vit læra okkum sjálv betur at kenna við søgunum, vit siga um okkum sjálv, og vit læra, hvar og hvussu vit brúka okkara styrkir. Tá ið vit vita tað, kunnu vit læra at brúka styrkirnar meira í gerandisdegnum. Tá ið vit brúka styrkirnar, verða vit glað og hugagóð, og vit fáa betri sjálvsvirðing, við øðrum orðum hava vit tað gott – vit trívast.

Tá ið tit spæla spælið, fara tit við søgunum at læra um styrkirnar hjá hvørjum øðrum, og tit fara at finna fram til nógvar ymiskar styrkir, sum eru virknar í tykkum øllum somlum.

Søgurnar, sum tit fortelja um tykkum, kunnu antin vera um frítíðina, skúlatíðini ella bæði. Tit velja.

Styrkispælið

Spælivegleiðing 6 - 11 ár



Í spælinum eru:

- 4 spæliplátur við teimum 24 styrkjunum
- 35 blá frásøgukort - skúli
- 60 gul frásøgukort - frítíð
- 4 sett av forvitniskortum
- 4 x 10 spælibrikkar
- 4 avkrossingartalvur. Minnist til at goyma tína talvu í Bókin um mínar styrkir, tí tit kunnu brúka hana næstu ferð, tit spæla styrkispælið.
- 1 plakat
- 1 tímaglas

Styrkispælið

Spælivegleiðing 6 - 11 ár

Allir luttakararnir leggja sína spæliplátu við teimum 24 styrkjunum framman fyri seg. Avkrossingartalvan skal liggja undir spæliplátuni. Tann, sum fortelur, leggur avkrossingartalvuna oman á sína spæliplátu.



Uppsetingin hjá frásøgufólkinum



Uppsetingin hjá áhoyrarunum

Luttakararnir býta forvitniskortini ímillum sín, lesa tey og leggja tey í ein stakk framman fyri seg. Leggið spælibrikkarnar við síðuna av. Hvørt sett hevur sítt merki: stjørna, fýrkantur, tríkantur ella sirkul.

Fyrsti luttakarin tekur eitt frásøgukort upp, og spælið er byrjað.

Tá ið ein luttakari tekur eitt frásøgukort upp, fortelur hann fyrstu søguna, sum kemur fram í huganum um tað, sum stendur á frásøgukortinum. Megnar hann ikki at byrja eina søgu um tað evnið, tekur hann eitt nýtt kort upp.

Tá ið frásøgufólkið er til reiðar at fortelja søguna, vendir luttakarin høgrumegin frásøgufólkið tímaglasinum við. Steðgar frásøgufólkið upp, kunnu áhoyrararnir brúka forvitniskortini.



Frásøgukort, frítíð




Frásøgukort, skúli

Ætla tit at leggja dent á styrkirnar, sum tit brúka í frítíðini, taka tit frásøgukortið frítíð. Ætla tit at leggja dent á styrkirnar, sum tit brúka í skúlanum, taka tit frásøgukortið skúli. Tit kunnu eisini blanda kortini.

Styrkispælið

Spælivegleiðing 6 - 11 ár



Styrkispælið

Spælivegleiðing 6 - 11 ár

Um spælið:

2 – 4 luttakarar

Tíð: umleið 25 minuttir pr. umfar. Best er at spæla tvey ella fleiri umfør. Hvør søga kann í mesta lagi vera 3 minuttir til longdar. Tímaglasið vísir 3 minuttir.

Uppseting:

Setið tykkum við eitt borð.

Leggið bláu og gulu frásøgukortini inn á miðjuna á borðinum.

Allir luttakararnir fáa hvør sína spæliplátu (sí myndina).

Luttakararnir fáa hvør sítt sett av forvitniskortum. Hvørt sett hevur sítt egna merki: (fýrkantur, sirkul, tríkantur, stjørna).

Allir luttakararnir fáa hvør sína avkrossingartalvu og seks spælibrikkar.

Øll skulu hava ein blýant í part.

Setið tímaglasið hjá frásøgukortunum.

Dømi um eina frásøgn:

Frásøgukort: Ein góð uppliving

Abbi og eg høvdu avtalað, at vit báðir skuldu fara á flot. Eg havi ongantíð verið á floti, men abbi hevði lænt ein bát, og hann vildi so fegin vísa mær, hvat tað er at fara á flot (útsýni).

Eg svav hjá ommu og abba, tí vit skuldu tíðliga upp. Abbi segði, fiskarnir bíta best á beint eftir, at teir eru vaknaðir (útsýni). Abbi kom inn og vakti meg, beint tá ið sólin reis. Eg var móður, men hann hjálpti mær upp, ballaði meg inn í dýnuna og bar meg oman í køkin, har vit ótu morgunmat saman (umsorgan).

Eg var øgiliga spentur, og tíbetur var abbi eisini spentur, og nú var løtan komin, har vit fóru á flot (eldhugur).

Tá ið vit sigldu fram við molanum, sá eg, at sólin skein niður í sjógvin. Sólstrálurnar dansaðu í vatnskorpuni, so tær líktust gimsteinum (ansur fyri tí vakra). Tað var blikalogn og einasta ljóðið, vit hoyrdu, var frá motorinum, sum førdi okkum út úr havnini og út í ævintýrið (dirvi).

Hvør einasta rukka í andlitinum á abba brosaði ímóti mær. Tað gráa skeggið, tann myrka húðin og rukkurnar kendust so fjálg, tí abbi ansar altíð væl eftir mær og sigur mær nógvar spennandi søgur um sítt lív, og tá ið eg eri saman við honum, hendir altíð okkurt spennandi (umsorgan, góðvild).

Vit sigldu so langt út, at vit sóu ikki oyggjarnar longur. Abbi kastaði akkerið, og so lógu vit har úti á miðjum havi. Abbi riggaði mína tráðu til og krøkti ein maðk á húkin. Síðan vísti hann mær, hvussu eg skuldi kasta.

Vit sótu og prátaðu, og abbi segði frá, tá ið hann hitti ommu, tá ið hon var arbeiðskona, og hann var bilmekanikari beint eftir seinna veraldarbardaga. Tað var so spennandi at hoyra djúpu røddina á abba siga frá, og eg ímyndaði mær, hvussu tað var, tá ið abbi hitti ommu (útsýni).

Vit fingu einki, men eg hugsaði slættis ikki um, at vit lógu úti á havinum í nógvar tímar, tí søgurnar hjá abba vóru so spennandi. Tvær ferðir dró eg línuna inn, og báðu ferð høvdu fiskarnar nappað agnið av húkinum. Men so krøkti abbi ein nýggjan maðk á, og eg kastaði aftur.

Tá ið nakrir tímar vóru farnir, lat abbi matpakkan upp, sum hann hevði smurt okkum. Hann gav mær eina sodavatn, og hann fekk sær kaffi. So sótu vit har og ótu og prátaðu og flentu. Abbi dugir ótrúliga væl at siga søgur (skemt, umsorgan).

Vit ætlaðu okkum at pakka saman, tí vit høvdu einki fiskað, tá ið tað nippaði í línuni á mínari tráðu. Abbi segði: "Hygga síggj, nú beit á hjá tær!" og so hjálpti hann mær at draga fiskin inn um stokkin (samstarv). Fiskurin var næstan líka langur sum armurin á abba, og hann hevði eisini okkurt, sum líktist høkuskeggi. Abbi segði, at skeggið eitur grunnnøs, og at fiskurin var ein góður toskur, og at toskur er góður matur. Omma skuldi fáa fiskin, so hon kundi gera okkum ein góðan fiskadøgurða. (forvitni, útsýni).


Tá ið vit komu heim, gav eg ommu toskin, og hon helt, at eg var óførur at hava fiskað ein so flottan tosk. Omma fekk sær ein hvassan knív og eitt skeribretti og kruvdi toskin. Hon segði, at eg kundi spyrja so nógv, sum eg orkaði. Omma vísti mær, hvussu hjartað, garnarnar og alt hitt í maganum á toskinum sá út (forvitni, útsýni).

Eg spurdi ommu, hvussu fiskar fáa anda niðri í sjónum. Omma helt, at tað var ein góður spurningur, og hon vísti mær táknurnar, sum fiskar anda við. Omma visti ikki rættiliga, hvussu fiskarnir bera seg at við at anda, so vit settu okkum við telduna og leitaðu á Google. Omma skrivaði: "Hvussu anda fiskar?" og so blivu vit bæði klókari (víðskygni, forvitni).

Tá ið eg kom heim, fann mamma eina skógvaeskju fram, og saman gjørdu vit eitt akvarium, har vit málaðu tara og sandbotn inn i eskjuna, og so kliptu vit fiskar út og hongdu teir inn í (kreativitetur). Tað bleiv so flott, og nú stendur eskjan á hillini í mínum kamari og minnir meg á hina ferðina, eg var á floti við abba (takksemi).

Er spurin

Navn:



Tú kannar eina søk frá øllum síðum, áðrenn tú tekur støðu.

Tær dámar væl at hitta menniskju við ymsum hugsanum og við øðrvísi bakgrund.

Tú lurtar eftir meiningunum hjá øðrum og megnar at broyta meining.

Tú hugsar skynsamt og tekur støðu út frá tí, sum tú hevur fingið at vita.

Kreativitetur

Navn:



Tú elskar at finna nýggjar hættir og nýggjar loysnir.


Tú fært nógv hugskot, og tær dámar avbjóðingar, har tú skalt hugsa øðrvísi.

Tær dámar nýhugsan og óvanlig, stuttlig og snild uppskot til loysnir.

Tú hevur livandi hugflog.

Skilvísi

Navn:



Tú verður ofta spurd/ur um, hvat tú heldur um eitt mál, tí at tú megnar at síggja mál frá fleiri síðum.

Tú ert góð/ur í ráðum, tí vinirnir biðja teg um ráð og halda, at tú ert klók/ur.

Tað sær út til, at tú altíð veitst, hvat er rætt at siga ella gera.

Tú skilir, hvat hevur týdning í lívinum.

Forvitni

Navn:



Tú hevur áhuga í nógvum og hevur nógv áhugamál.


Tú ert forvitin um tað, sum hendir.

Tú heldur, at nýtt og nýggj evni eru spennandi.

Tú elskar at kanna og at finna nýtt.

Víðskygni

Navn:



Tú elskar at fáa meira vitan.


Tú elskar at læra nýtt.

Tær dámar at brúka tíð at leita eftir svarum til tað, sum undrar teg.

Tær dámar at finna fram til, hvussu okkurt virkar.

Ærligheit

Navn:



Tú ert ærlig/ur og sonn/sannur, og onnur líta á teg.


Tú ert tann, tú ert, og tú gert tað, tú sigur.

Tú spælir ikki snild/ur ella týdningarmikil fyri at tekkjast øðrum, men tú sigur tað, tú meinar.

Tú heldur tað, sum tú lovar.

Umsorgan

Navn: _____




Tú hevur tørv á at hava gott og tætt samband við tey, sum tú ert best/ur við.

Tú vísir kærleika við tí, sum tú sigur og gert.

Tú hevur góðar og trúgvar vinir, og tit hava umsorgan hvør fyri øðrum.

Tú hevur álit á tínum nærmastu. Tit lurta eftir hvørjum øðrum og kunnu vísa, at tit eru kedd ella ótrygg.

Fyrigeving



Navn: _____

Tú gevur øllum ein møguleika afturat.


Tú dugir væl at lata fortíðina fara og lítur frameftir.

Tú megnar at vísa vreiði, men tú verður ikki óndsinnað/ur og vilt ikki hevna.

Tú verður ikki tikin av fótum, tá ið tú verður særd/ur, og tú reisir teg aftur.

Góðvild

Navn: _____



Tú hugsar um, hvussu onnur hava tað.


Tú ert blíð/ur og gávumild/ur, og gert fegin onkrum eina tænastu, hóast tú hevur skund.

Tú hjálpir øðrum óbiðin.

Tær dámar at gera øðrum væl, hóast tú ikki kennir tey so væl.

Falsloysi

Navn: _____



Tú heldur, at øll hava rætt at verða rættvíst viðfarin.

Tú heldur reglur, sum semja er gjørd um.

Tú virðir onnur og teirra meiningar.

Tú góðtekur ikki, at nakar verður órættvíst viðfarin.

Dirvi

Navn: _____



Tú torir at siga øðrum ímóti, hóast tú verður illa umtókt/ur av tí.


Tú stendur fast við tíni sjónarmið.

Tú berjist fyri tí, sum er týdningarmikið fyri teg, og tú torir at siga tína meining.

Tú ert djørv/djarvur á nógvan ymsan hátt: likamliga, kensluliga, andaliga og í hugsanum.

Sosialt medvit

Navn: _____



Tú veitst væl, hvussu onnur hava tað.


Tú kennir teg sjálva/n sera væl og semist væl við onnur.

Tú dugir væl at meta um, hvussu hini hava tað, og hví tey siga og gera soleiðis, sum tey gera.

Tú dugir at fáa onnur at hava tað gott og veitst, hvussu tú skalt bera teg at sosialt.

Bjartskygni

Navn: _____



Tú væntar altíð tað besta av framtíðini.

Tú sært okkurt positivt í øllum støðum.

Tú dugir væl at síggja møguleikar og at hugsa positivt – eisini vegna onnur.

Tú gevst ikki, hóast mótburð.

Spiritualitetur

Navn: _____



Tú grundar um meiningina við lívinum og alheiminum.

Tú ert trygg/ur við hugsanina um, at ein størri ætlan er við øllum.

Tú heldur, at meira er ímillum himmal og jørð, enn vit vita um.

Tú veitst, at tað hevur stóran týdning, hvussu tú livir lívið.

Takksemi

Navn: _____



Tú sært og gleðist um tað góða í lívinum, sum tú ikki tekur fyri givið.

Tú sigur ofta "Takk" – eisini fyri tað lítla – og dugir altíð at finna okkurt at gleðast um.

Tú hevur lætt við at rósa øðrum og vísir, at tú ert glað/ur um tað, hini gera fyri teg og felagsskapin.

Tú heldur, at vit skulu geva tí gætur, tá ið onkur ger eina góða gerð.

Skemt

Navn: _____



Tú sært tað stuttliga í lívinum, og tær dámar at fáa onnur at smílast og at flenna.


Tú roynir at síggja tað góða í øllum lívsins viðurskiftum.

Tú dugir væl at brúka skemt soleiðis, at øll hava tað gott saman við tær og eru í góðum lag.

Tú elskar at flenna og at siga skemtisøgur og stuttligar søgur.

Ansur fyri tí vakra

Navn: _____



Tú gevur tær fær um og elskar tað, sum er vakurt í náttúruni, í listini, í tónleikinum ella í menniskjum.

Tú steðgar á, letur tíðina fara og luktar, smakkar og lurtar eftir tí ótrúliga rundan um teg.

Tú hevur áhuga í filmi, myndum, tónleiki, drama, náttúruni og øðrum.

Tær dámar at tosa um góðar upplivingar og tað, sum gongur væl.

Leiðsla

Navn: _____



Tær dámar at taka ábyrgd og at leiða.

Tú dugir væl at skipa bólkaarbeiði og stuðlar bólkinum í at arbeiða saman.

Tú ert ein góð fyrimynd fyri onnur og hjálpir øðrum at gera arbeiðið liðugt.

Tú dugir væl at skipa fyri tiltøkum og at syrgja fyri, at tey verða sett í verk.

Egintamarhald

Navn: _____



Tú loypur ikki framav og megnar at stýra tínum huga og tínari trongd.


Tú hevur tamarhald á sinninum og megnar at stýra tínum tonkum og kenslum.

Tú ert skipað/ur og dugir at siga, at nú er nokk.

Tú dugir at hugsavna teg og veitst, hvat tú ætlar, og tær dámar best greiðar reglur fyri, hvat tú skalt gera.

Fyrilit

Navn: _____



Tú hugsar teg væl um, áðrenn tú sigur ella gert okkurt.


Tú ert varin og skilagóð/ur og megnar at taka tungar avgerðir, tí tú hevur hugsað um, hvat er best í longdini.

Tú ert umhugsin og leggur dent á ikki at særa onnur.

Tú ert skilagóð/ur, hugsar teg væl um og velur ikki altíð lættastu loysnina.

Lítillæti

Navn: _____



Tú hevur tað best uttan fyri pallin.


Tú letur tað, sum tú hevur gjørt, tala fyri seg.

Tú deilir tíni góðu úrslit við tey, sum hjálptu tær.

Tú fært onnur fram og gevur burtur av tínari viðurkenning.

Samstarv

Navn: _____



Tú arbeiðir væl saman við øðrum.

Tú tekur ábyrgd av arbeiðinum í bólkinum og at bólkurin virkar saman – eisini sosialt.

Tín partur liggur ikki eftir í bólka-arbeiði og tú arbeiðir fyri, at tit fáa eitt gott úrslit.

Tú góðtekur avgerðir, sum bólkurin tekur.

Eldhugur

Navn: _____



Tú ert full/ur í orku og ert altíð í gongd við onkra verkætlan.

Tú gloymir teg lættliga burtur í uppgávum, og tú gert einki hálvt.

Tú ert ofta spent/ur eftir at byrja.

Tær dámar at vera virkin, og fyri teg er lívið eitt ævintýr.

Áhaldni

Navn: _____



Tú arbeiðir hart at fullføra tað sum tú ert farin undir, hóast tað er trupult.

Tú gevst ikki, men heldur á, til tú hevur gjørt uppgávuna lidna.

Tú megnar at siga nei til skemt og spæl, tá ið okkurt skal verða liðugt ein ávísan dag.

Tú hevur tað gott, tá ið ein uppgáva er liðug.

Til frásøgufólkið:

- Sig, hvat stendur á frásøgukortinum.
- Byrja við byrjanini – ikki byrja við at siga kjarnuna í søguni.

  Hvør var við, hvat hendi, og hvar vart tú, hvat gjørdi tú?
- Brúka myndamál og brúka sansirnar. Greið frá umhvørvinum, ljóðum og luktum, og greið frá smakkum og kenslum.

Til áhoyrararnar:

Áhoyrararnir hyggja at sínari spæliplátu, ímeðan teir lurta. Hvørjar styrkir eru í frásøgnini? So hvørt teir hoyra, at ein styrki er virkin í søguni, skulu áhoyrararnir leggja ein spælibrikk á ta styrkina á spæliplátuni.

Styrkin kann koma soleiðis til sjóndar :

- Tað, sum frásøgufólkið gjørdi ella segði um seg sjálvt ella onnur, tá ið hann/hon greiddi frá.
- Hvussu søgan verður søgd.

Tá ið frásøgufólkið hevur sagt sína søgu, skulu áhoyrararnir skiftast um at siga, hvar teir hava lagt spælibrikkar og greiða frá, hvussu teir hoyrdu, at styrkirnar vóru virknar.

Hvørja ferð frásøgufólkið fær eina styrki, setir hann/hon X í avkrossingartalvuna ella í talvuna í 8.venjing í Bókin um mínar styrkir. Seinni kann talvan vera íblástur, tá ið tit skulu finna tykkara egnu styrkir.

Er søgan um ein annan persón enn frásøgufólkið, skulu áhoyrararnir taka allar styrkirnar við – bæði tær, sum tit síggja í persóninum, sum søgan er um og tær, sum tit síggja í frásøgufólkinum.

Spælið í minsta lagi tvey umfør, soleiðis at øll sleppa at siga frá minst tvær ferðir.